Bára Michelsen

Fra: Sjúrður Simonsen
Sendt: 20. oktober 2025 08:22
Til: Fíggjarmálaráðið
Emne: SV: Til ummælis: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)
Vedhæftede filer: 250917_JS_útreiðsluvøkstur_uppskot.pdf

Góðan dagin HMR j. nr.: 25/25241

Heilsumálaráðið hevur lisið uppskotið og hevur hesar viðmerkingar/spurningar:

- Sambært §7a stk. 4 skal Búskaparráðið almannakunngera hvussu nógv prosent rakstrarútreiðslurnar í mesta lagi kunnu vaksa. Er hetta tilsamans prosent ella bara hvat 1 % svarar til í krónum?

- Hvussu verður mannagongdin fyri fráboðanina frá Búskaparráðnum, um rakstrarvøksturin er í samsvari við hámarkið, kemur hetta áðrenn ella aftaná fíggjarlógaruppskotið/uppskot til karmar eru framlagdir í Løgtinginum? Hvat er freistin hjá Búskaparráðnum?

- Um so er, at Búskaparráðið fráboðar, at rakstrarvøksturin er hægri enn hámarkið, hvussu ber landsstýrisfólkið í fíggjarmálum seg at? Skal fíggjarlógaruppskotið/uppskot til karmar trekkjast aftur fyri at framleggja eitt nýtt ella skal eitt broytingaruppskot leggjast fyri Løgtingið?

- Hámarkið fyri rakstrarvøksturin verður 1 %, umframt lønar- og prísvøkstur. Hvussu er við demografiskum broytingum? Heilsumálaráðið hevur seinastu árini framskrivað við 1 prosenti á øllum sjúkrahúsunum í sambandi við demografiskar broytingar (broytta fólkasamanseting), og framskrivað aðrar størri kontur vegna annað enn prísvøkstur, sum t.d. Heilsutrygdarveitingar. Merkir hetta at ongin onnur framskriving kann verða um demografiska framskrivingin rakar hámarkið?

- Hvussu tryggjar mann at langtíðar løguætlanin verður hildin? (serliga tey 3 árini sum eru bindandi)

Vinarliga/Sincerely

Sjúrður Simonsen

Fulltrúi/Head of Section

Heilsumálaráðið / Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734014
sjurdur.simonsen@hmr.fo• www.hmr.fo

Fra: Bára Michelsen <Bara@fmr.fo>
Sendt: mikudagur, 17. september 2025 15:31
Til: LMS - Aðalráðini <LMS-Adalradini@drift.far.fo>; Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Búskaparráðið <buskaparradid@buskaparradid.fo>; LgPostur <Postur@lg.fo>; industry@industry.fo; Ann Ellingsgaard <ann@samstarv.fo>
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Eli Christiansen <Eli@fmr.fo>
Emne: Til ummælis: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

Góðan dagin

Hjálagt verður sent tykkum til ummælis “**Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)”**

Í samgonguskjalinum stendur, at “í breiðum politiskum semjum skulu vit tryggja búskaparliga haldførið og gera langtíðar rakstrar- og løguætlanir. Í hesum sambandi verður gjørt eitt fíggjarpolitiskt regluverk.”

Frágreiðingar frá Búskaparráðnum vísa, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur, og mælir ráðið til eitt fíggjarpolitiskt regluverk.

Uppskotið fevnir um landsins fíggjarlóg og hevur sum endamál at seta hámark fyri, hvussu nógv útreiðslurnar hjá landinum til rakstur kunnu vera. Fíggjarlógin kann ikki hava rakstrarútreiðslur, sum til samans eru meira enn 1% hægri enn rakstrarútreiðslurnar undanfarna ár, umframt framskriving fyri lønar- og prísvøkstur.

Uppskotið fevnir eisini um løgujáttanir og løgukendar játtanir hjá landinum, sum skulu vera í samsvari við løguætlan, sum Løgtingið hevur samtykt.

Uppskotið hevur ásetingar um, hvussu hámarkið skal verða ásett, og hvussu eftirlit skal verða við, at hámarkið verður hildið.

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Møgulig ummæli ella ummælisskriv skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 15.10 2025.

Vinaliga / Kind regards

Bára Michelsen
Samskipari / Coordinator

Office: +298 352020
Mobile: +298 552030
bara@fmr.fo

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Office: +298 352020
www.fmr.fo